# 70

## KÓRSANGARAR TIL FINNLANDS

Týsdagin 21. september fara 70 kórsangarar úr Føroyum á norðurlendska kirkjusangarastevnu í Vasa í Finlandi. Hetta er 3. ferð at skipað verður fyri slíkari stevnu og fyrstu ferð at umboð úr Føroyum luttaka.

Kórini, sum eru við eru kirkjukórið Ljómur úr Vági, Toftakórið av Toftum og Vágakórið úr Vágum. Hesi kór hava verið savnað nakrar ferðir í farna ári, hava vant saman og sungið saman. Seinast til ólavsøkuguðstænastuna í Havnar kirkju í ár.

Á stevnuni í Finlandi luttaka 800 kórsangarar úr norðanlondum. Kórið úr Føroyum fert at umboða Føroyar við føroyskum kórsangi á konsertum og guðstænastum, og avtala er eisini, at føroyskur dansur skal vera festtiltakið leygarkvøldið. Eitt annað tiltak er Symfonisk salm, har allir 800 stevnuluttakararnir saman syngja ein sálm úr hvørjum norðanlandi. Føroyski sálmurin er »Sum ígjøgnum sortar skýggja« sungin við tí gamla føroyska sálmalagnum. Allir luttakarar eru annars teknaðir til at syngja í ymiskum verkstøðum, har kendir norðurlendskir kórleiðarar leiða kórsangin.



**ÓVANLIGA GROVT**

*Mitt í summar var óvanliga groft herverk framt í Mykinesi, har ein gekk berserkargongd og legði alla oynna lamna. Løgreglan hevur lagt nógv fyri í eini roynd at uppklára málið, men má nú gevast uttan at gerningsmaðurin er funnin*

# Grovt herverk í Mykinesi verður ikki uppklárað

**HERVERK** Løgreglan hevur nú steðgað arbeiðnum at uppklára eitt umfatandi og groft herverk í Mykinesi í summar

Áki Bertholdsen

Tað er nú greitt, at umfatandi og grova herverkið í Mykinesi eina náttina síðst í juni mánaði í ár, verður ikki uppklárað.

## Tað bara ikki til at finna nøkur fellandi prógv

Michael Gram, politistur í Vágum, staðfestir fyri Sosialinum, at løgreglan hevur ásannað, at tað ber ikki til at koma víðari við málinum og sostatt er málið slepst.

Og tað verður ikki tikið upp aftur uttan so, at løgreglan fær heilt avgerðandi nýggjar upplýsingar sum gera, at tað ber til at finna tann seka.

Tað kundi kanska verið eitt eygnavitni, sum ikki hevur latið við seg koma higartil.

Løgreglan hevur serliga havt illgruna til ein ávísan mann, men tað ber ikki til at festa nøkur haldgóð prógv á hann og tí er tað nyttuleyst at reisa ákæru.

Og fyrsta dagin fer løgreglan at senda boð eftir honum og fortelja honum, at málið er slept.

Av tí at løgreglan ikki fær felt gerningsmannin, ber heldur ikki til at siga nakað um, hvat orsøkin til herverkið var.

### Løgdu nógv fyri

Tað varð annars lagt nógv í royndunum at uppklára málið.

Í hesum sambandi hevur løgreglan lagt hald á einar skógvar hjá manninum, tí fótafarið eftir hann stóð í einum oljubletti á einum borði.

Fótafarið varð sent til kanningarn, men tað var so avskeplað av oljuni, at har fekst onki prógv burtur úr, tí fótafar og skógvar kundu ikki tengjast saman í tann mun, at tað kundi brúkast sum prógv í einum rættarmáli.

Síðsta royndin var at taka DNA royndir av einum handtaki á eini hurð, sum gerningsmaðurin hevur rørt við.

Men tað eydnaðist heldur ikki, tí tað bar ikki til at fáa ein DNA profil, sum kundi brúkast í einum rættarmáli.

– Sostatt hevur ikki borið til at finna nøkur fellandi prógv og av tí saman hevur løgreglan endað sínar kanningar, sigur Michael Gram.

aki@sosialurin.fo

## Vildi illa til, kundi tað endað heilt galið

## Púra ørur

**Tað var mikunáttina 23. juni, at Mykines varð herjað av herverki, sum tey neyvan nakrantíð hava upplivað áður.**

**Mykinesfólk varnaðust, at alt var ikki sum tað átti, tá ið tey vaknaðu um náttina og ansaðu eftir, at streymurin var farin.**

**Tá ið tey kannaðu málið, sóu tey, at tangin hjá SEV var tómur, hóast hann akkurát var fyltur.**

**Tað var skilligt, at talan var um herverk og at onkur hevði skrúvað kranan frá og tømt tangan.**

**Herverksmaðurin var eisini farin inn í húsið hjá SEV, har hann hevði gjørt seg inn á eina sláimaskinu og fylt sukur í bensintangan.**

**Hann ripaði eisini stólar, skamlar og annað úr húsinum, út av eggini.**

**Somuleiðis vórðu tvær fullar oljutunnur rullaðar oman eftir dráttinum og líka í havið.**

**Hol fór á aðra tunna, so at oljan lak úr og elvdi til oljudálking.**

**Hin hvarv til havs.**

**Haðani fór herverksmaðurin út á eggina, har tey plaga at njóta útsýnið og har bóltaði hann ein stein útav, sum varð settur har fyri nógvum árum síðani og sum fólk hevði at sita á, tá ið tey eygleiddu lívið og náttúruna rundanum.**

**Og at enda varð eldur eisini settur á eina timburrætt.**

**– Serliga hetta síðsta verður tikið í álvara, tí rættin stendur í forlongilsi av einum træhúsi, sum aftur er fast í einum sethúsum úr træi, har fólk lógu og svóvu, so vildi ikki til, kundi tað enda galið, sigur Michael Gram, løgreglumaður.**